LM-037/2025

FYLGISKJAL 2

Alzheimerfelagið

Tórshavn 30. sept. 2025

Viðmerkingar til hoyring viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m (Ábyrgd av dagtilboð og umlætting til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar)

Alzheimerfelagið fegnast um, at tað endiliga verður tikið stig til at samla demensøkið hjá einum myndugleika, og felagið tekur undir við ætlanini um, at flyta ábyrgdina av at veita tænastur og tilboð til fólk við demenssjúku, sum eru undir fólkapensjónsaldur til kommunurnar. Hetta gevur kommununum uppgávuna at málrætta tænastur og tilboð til yngri við demens.

Tað er sera umráðandi at kommunurnar taka hædd fyri einum øðrvísi tørvi hjá yngri fólki við demenssjuku, sum búgva á røktarheimum, at tað verða gjørdar fyriskipanir, sum stuðla undir teirra tørvi, sum í flestu førum er øðrvísi enn hjá eldri fólki.

Í Alzheimerfelagnum er uppskotið viðgjørt, og mælt verður til fylgjandi broytingar í orðingum:

§10, stk 1 og §10 stk 2
*"**§ 10, stk. 1** verður orðað soleiðis: "Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti og borgara undir fólkapensjónsaldur við demens**sjúku, tænastur,** ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at hann kann búgva í egnum heimi sum longst."* 1) Mælt verður til, at orðið **"tænastur"** verður broytt til **"heildartænastur"** . Í leingjan av hesum, at orðingin í **§10 stk 2,** (sum ikki er fevnt av broyting í tykkara uppskoti) verður orðað: *"Stk. 2. Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, ergoterapi, fysioterapi, fyribyrgjandi venjing, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing, **og til borgarar við demenssjúku dag- og kvøldtilboð, vikuskiftistilboð við umlætting, avloysaraskipan í heiminum, musikterapi** o.s.fr."*
Endamálið er, at borgarar við demenssjúku fáa eitt samanhangandi heildartilboð, sum eisini umfatar kvøld og vikuskiftistilboð, heldur enn fragmenteraðar tænastur.

§10 a stk 1
*§ 10 a, stk. 1 verður smb. verandi uppskoti orðað soleiðis: "Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjonist og borgara undir fólkapensjónsaldur við demens**sjúku,** ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing. **Endurvenjing verður veitt við tí endamáli,** at borgarin: 1) kann búgva heima sum longst og 2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi."* 1) Mælt verður til at broyta orðingina "*Endurvenjing verður veitt við tí endamáli (...)*" til: " *Endurvenjing verður veitt við **grundarlagi í eini endurvenjingarætlan við tí endamáli at borgarin kann: 1) menna mistan førleika og varðveita verandi førleikastøði og 2) vera virkin í egnum lívi sum longst.***

Alzheimerfelagið

Endamálið er at tryggja, at endurvenjingin fylgir einum ætlaðum leisti, heldur enn at verða veitt fragmentera, og at borgarin kann verða virkin í egnum lívi óansæð bústað.

Harumframt verður mælt til
- at allastaðnis í lógartekstinum, har orðað er: "*Kommunurnar veita (...)*" skuldi staðið: "*Kommunurnar **skulu** veita* (...) "

- og at allastaðnis í lógartekstinum, har tað stendur "demens", kemur at standa "demenssjúka".

- og at tað í lógartekstinum framgongur, at "*kommunan skal tryggja kommunala demenssamskipan til borgarar við demens, og/ella borgarar við tekin uppá demenssjúku.*"

Orsøkin er, at orðið demens ofta verður misskilt sum aldurdómstekin, hóast tað í nógvum førum er ein sjúka, ið eisini kann raka yngri fólk.

Grundgevingar
Yngri við demenssjúku hava ikki fingið nakað *heildar*tilboð frá landinum, ið hevur havt stórar og vanlukkuligar avleiðingar fyri tær familjur, sum hetta hevur rakt.
Landið skal tó hava rós fyri, at hava havt tvey vælvirkandi *dag*tilboð, til yngri fólk við demenssjúku, við dugnaligum og eldhugaðum starvsfólkum.

Dagtilboð
Fyrsta dagtilboðið var sett á stovn í des. 2017 í Havn, og næsta á Glyvrum í 2021.
Bæði dagtilboðini hava virkað væl og havt kvalifiseraði og støðug starvsfólk. Tey vóru løgd saman í ár.
Dagtilboðini hava øll árini einans verið opin um dagin gerandisdagar, hóast tørvur hevur verið á kvøld og vikuskiftis tilboði eisini. Somuleiðis hava dagtilboðini verið stongd um summarið.
Alzheimerfelagið vil tí mæla kommununum til, at halda fast við hesi vælvirkandi tilboð.

Kvøldtilboð og vikuskiftisumlætting
Alzheimerfelagið hevur fleiri ferðir heitt á avvarðandi myndugleika um at uppraðfesta dagtilboðið, sambært **tilmæli 5. í Demensætlanini frá 2015**, til eisini at fevna um kvøldtilboð og vikuskiftisumlætting við endamálið, at lætta um hjá avvarðandi, ið gerast sperd av støðuni.

Smidligar og títtari tíðarskeið
Alzheimerfelagið hevur somuleiðis heitt á landið um, at menna eitt tilboð við smidligari umlætting við styttri og títtari tíðarskeiðum. Hetta skal bjóðast familjunum langt fyrr í sjúkugongdini enn gjørt verður í dag.

Yngri fáa ikki bjóða umlætting
Alzheimerfelagið vil við hesum vísa á, at umlætting verður bjóðað *alt ov seint* í sjúkugongdini og at landið ikki hevur raðfest smidligar, styttri og títtar umlættingar t.d. vikuskiftisumlætting, sambært **tilmæli 5. í Demensætlanini frá 2015**, men hevur einans dúva uppá at keypa

Alzheimerfelagið

longrivarandi umlætting á røktarheimunum hjá teimum fáu eldrasamstørvunum/Tórshavnar kommunu, sum eru sinnað at selja pláss til landi

Hetta sæst eisini aftur í viðmerkingunum til lógaruppskotið, har víst verður á hagtøl hjá landinum, sum vísa, at tað ongantíð eru meira enn 1-3 borgarar, sum tørva/fáa umlætting í senn. Hetta eru døpur hagtøl, sum einans staðfesta, at umlætting verður skipað alt ov sjáldan og nógv for seint í sjúkugongdini, heldur enn eftir tørvi.

Alzheimerfelagið er somuleiðis av teirri fatan, at tað er ein misskiljing, tá ført verður fram, at *"so hvørt demenssjúkan versnar, vísur tørvurin seg eisini á umlætting. Tað er ein sannroynd, at tørvurin á búplássi ofta vísir seg samstundis..."*.

Hendan tilgongdin og skipanin hevur havt við sær, at tey yngru við demenssjúku alt ov sjáldan og nógv ov seint í sjúkugongdini hava fingið møguleika fyri umlætting, og hevur hetta í flestu førum verið, tá støðan heima er vorðin ótolandi.
Alzheimerfelagið mælir kommununum til at tryggja eina hóskandi og nøktandi avloysara- og umlættingarskipan við *smidligari, styttri og títtari* umlætting til yngri fólk við demenssjúku, sum verður bjóðað *tíðliga* í sjúkugongdini og harvið avlastar familjuna regluliga, heldur enn so seint, at tann demensrakti er vorðin so sjúkur, at tørvur nærmast er á føstum búplássi.

Ein slík umlættingarskipan kann við góðum virknað skipast sum ein avloysaraskipan[1], at byrja við. Avloysaraskipanir í donskum kommunum[2], hava víst seg at hava sera góða virkna og viðføra, at tørvur á umlætting uttanfyri heimið kann útsetast.

Heildartilboð er neyðugt
Tað er sostatt alneyðugt at menna eitt heildartilboð til yngri fólk við demenssjuku og teirra familjum, sum umfatar dag, kvøld og vikuskiftir, styttri og títtari tilboð. Týðandi er eisini, at tilboð verður veitt í tí løtu sjúkan vísir seg og ígjøgnum alla sjúkugongdina, so til ber at búgva heima sum longst. Setast skal inn sambært **tilmæli nr. 9. í Demensætlanini frá 2015** við stuðli og hjálp, so skjótt sjúkan vísir seg.

Ymsar tænastur kring landið
Stórur munur er á, hvør borgari fær tilboð um umlætting, tí fleiri kommunur/eldrasamstørv selja ikki umlættingarpláss til landið. Hetta merkir, at fleiri yngri borgarar við demenssjúku als ikki fáa tilboð um umlætting. Tað gongur útyvir teirra avvarðandi.

Gransking bæði í Føroyum[3] og aðrastaðnis[4] vísur, at avvarðandi at fólki við demenssjúku, eru meira útsett fyri at fáa tunglyndi, strongd, trupulleikar við svøvni og likamligar sjúkur, og tí eru í størri vanda fyri at doyggja enn onnur.

Tørvur á serligum fyriskipanum til tey yngru og teirra familjur

---

[1] https://www.kl.dk/sundhed-og-aeldre/kronisk-sygdom/demenshandlingsplan
[2] https://www.sst.dk/da/udgivelser/2020/Tilbud-for-yngre-borgere-med-demens

[3] Støðan hjá avvarðandi at persónum við demens, 2020: https://www.alzheimer.fo/vitan/
Nyggjasta kanning av støðuni hjá avvarðandi, sum er gjørd í 2025, verður tøk á heimasíðuni. www.alzheimer.fo í næstum.
Kortlægning af demensområdet i Danmark 2010:
[4] https://www.kl.dk/sundhed-og-aeldre/kronisk-sygdom/demenshandlingsplan

Alzheimerfelagið

Tormóður Stórá, depilsleiðari á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum vísti á, í samband við Altjóða Alzheimerdagin 2024, hvørjar avbjóðingar tey yngru, sum verða rakt av demenssjúku og teirra familjur koma í, og hví tað er neyðugt við serligum fyriskipanum til hendan málbólkin:

"Yngri við demensi og teirra avvarðandi hava tørv á serliga skipaðum stuðli og átøkum. Tey hava eisini tørv á at hitta onnur, sum eru í somu støðu. Eisini er umráðandi at fáa nakrar fyriskipanir/tilboð, sum kann hjálpa við teirra tørvi og ynskjum, og sum eisini fylla gerandisdagin við onkrum gevandi, tá arbeiðslívið má enda. Tað er ein avbjóðing at finna og skipa hesi tilboðini til tey yngru við demensi.
Eisini tey avvarðandi, bæði vaksin, ung og børn í familjuni, hava tørv á serligum tilboðum um stuðul og at hitta onnur, sum hava onkran yngri í familjuni, sum hevur fingið demens."[5]

Uppihaldsgrundarlag og røktarviðbót
Alzheimerfelagið skilir uppskotið soleiðis, at tær veitingar, sum í dag verða veittar yngri fólki við demenssjúku, sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og almannapensjónslógini, framhaldandi verða galdandi fyri hendan málbólk, aftaná at demensøkið verður samlað hjá kommununum, sambært hesum lógaruppskotið.

Arbeiðstilboð
Tað hevur sera stóran týdning fyri fólk undir pensjónsaldur, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, tá tey gerast sjúk, at fáa hjálp og stuðul so skjótt sum møguligt, at fáa í lag avtalur við arbeiðsgevaran um, at kunna halda á í starvinum, so leingi tað er gjørligt, eitt nú við fíggjarligum stuðli til tillagað starv og evt. avtalu um løn.

Alzheimerfelagið mælir til, at landið fer undir at menna eina skipaða og miðvísa tilgongd, sum kann tryggja fólki undir pensjónsaldur, ið fáa demens, eitt tillagað og longri tilknýti til arbeiðsmarknaðin, aftaná at tey hava fingið staðfest demens.
Hetta krevur m.a. tættari samstarv og neyvari upplýsing og vitanarspjaðing til arbeiðsmarknaðin, og at tað eru skjótar og smidligar fyriskipanir, sum eru einsháttaðar fyri alt landið.

Hjálpar -og røktarviðbót
Eisini er umráðandi, at tey yngru framhaldandi eru fevnd av at kunna fáa hjálpar- og røktarviðbót frá landinum eins og í dag. Alzheimerfelagið mælir til. at tillutað røktarviðbót kann varðveitast hóast ein er fluttur inn á røktarheim at búgva. Hetta kann tryggja eina skipan har tann demensrakti kann halda á við at hava ein innihaldsríkan gerandisdag og luttaka í aktivitetum uttan fyri røktarheimið. Hetta skal síggjast sum **tilmæli 9 í demensætlanini** um stuðulstímar til fólk ið demenssjúku.

Fyritíðarpensjón
Eins og møguleikan hjá fólki undir pensjónsaldur fyri tillagaðum starvi og framhaldandi at kunna fáa hjálpar- og røktarviðbót, er tað sama galdandi fyri framhaldandi at kunna fáa tillutað fyritíðarpensjón.

Hjálpartól

[5] http://sosialurin.fo/news-detail/yngri-folk-faa-eisini-demens

Alzheimerfelagið

Tað er stórur tørvur á at menna vitan og serførleikar innan hjálpartól til fólk við demenssjúku. Tað er aloftast onnur hjálpartól, enn tey vanligu hjálpartólini, vit kenna til fólk við rørslutarni o.l. Alzheimerfelagið mælir til at Almannaverkið, sambært **tilmæli nr. 4. í Demensætlanini frá 2015,** útnevnir terapeutar, sum samla vitan og royndir um hjálpartól, málrættað fólki við demenssjúku. Tað er eisini neyðugt at tryggja góða implementering og uppfylging av hjálpartólum til fólk við demensi.